# P/F Wenzel vent gongdini

**Partapeningurin mistur. Framhaldandi rakstur er treytaður av, at kapitalgrundarlagið verður styrkt. Hetta var greiða talan frá grannskoðaranum hjá P/F Wenzel um ársroknskapin 2002. Petur Petersen, stjóri á P/F Wenzel, sigur, at ringa gongdin er vend, og framtíðin sær lovandi út**

BILAFYRITØKA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*Fíggjarliga støðan hjá P/F Wenzel var alt annað enn góð í fjør. Elsta bilafyritøka í landinum hevði eitt undirskot á góðar 2.mio. krónur, og misti allan eginpeningin. Petur Petersen, stjóri á P/F Wenzel, sigur, at vend er komin í, og fyritøkan fer eftir øllum at døma at hava yvirskot í ár.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Bilasølan P/F Wenzel hevur verið í rættiliga trongum skóm. Roknskapurin fyri 2002 er alt annað enn góður. Fyritøkan hevði eitt hall á góðar 2. milliónir krónur.

Talan frá grannskoðaravirkinum, Rasmussen & Weihe, er greið: Allur partapeningurin er mistur, og skal fyritøkan halda fram við rakstri fyri eyga, er bráðneyðugt, at kapitalgrundarlagið undir fyritøkuni verður styrkt, og at fyritøkan vendir gongdini.

Grannskoðaravirkið tosar við stórum bókstavum, og eftir øllum at døma hevur tað gjørt mun.

Sambært stjóranum í P/F Wenzel, Petur Petersen, er gongdin vend. Við øðrum orðum er fíggjarliga støðan hjá elstu bilafyritøkuni í Føroyum betrað munandi.

## Endurmeting

Petur Petersen greiðir frá, at leiðslan á P/F Wenzel hevði ein fund í august mánaði í fjør, har tað bleiv avrátt, at øll fyritøkan skuldi endurmetast.

– Høvuðstrupulleikin í fjør var vantandi likviditetur, og vit settu okkum fyri, at fíggjarviðurskiftini máttu ongantíð ov skjótt fáast upp á pláss. Onnur viðurskifti hava heldur ikki riggað til fulnar, men tær ætlanirnir, vit settu okkum fyri í fjør, hava eydnast. Ringa gongdin er tí nú vend, sigur stjórin á P/F Wenzel.

Petur Petersen greiðir frá, at fyritøkan hevur ikki dult fyri nøkrum, at fíggjarliga støðan ikki var hin besta. P/F Wenzel hevur havt tætt samband við peningastovnar og útvegararnar, sum hava kunnað fylgt støðuni.

## Pluss í ár

Stjórin sigur seg vænta, at fyritøkan kemur út við einum yvirskoti í roknskapinum í ár.

– Vit hava vent hvørjum steini, og tað hevur verið torført. Innanhýsis broytingar í fyritøkuni hava eisini verið gjørdar, har eg millum annað kom í stjórasessin. Eg setti mær fyri, at fyritøkan skuldi hava pluss á roknskapinum í ár, og tað sær út til at fara at eydnast. Vit eru væl fyri aftur, og tað er at fegnast um, at ætlanirnar, vit stungu út í kortið, hava eydnast, greiðir Petur Petersen frá.

Stjórin á P/F Wenzel gevur leiðslubólkinum eitt stórt herðaklapp fyri sítt góða arbeiði seinasta árið. Leiðslubólkurin hevur lagt nógv fyri, og hevur gjørt sítt til, at fíggjarviðurskiftini eru komin í rætt lag aftur.

## Einasta undirskotið

Sambært roknskapinum fyri 2002 hjá teimum stóru bilafyritøkunum kring landið, er P/F Wenzel einasta fyritøkan, ið hevur reyð tøl at vísa á. Bilasølurnar Meinhard Arge, Berg Motors, Reyni Service og Ivan Johannesen kunnu nevnast sum bilafyritøkur, ið høvdu stórt yvirskot. Reyni Service var best fyri við heili 28 mio. krónur í yvirskoti.

Tað kann tykjast undrunarvert, at P/F Wenzel er einasta bilafyritøkan við undirskoti í fjør, tí Ford er eitt vælumtøkt bilamerki í Føroyum. Stjórin sigur, at tað er ikki nøkur eintýdd frágreiðing um ringu fíggjarstøðuna í fjør. Tað vóru nógv ymisk viðurskiftið, ið gjørdu seg galdandi, men tað týdningarmesta er, at gongdin er vend, og framtíðin sær lovandi út, sigur Petur Petersen.

## Ólóglig lán

Rasmussen & Weihe hartar eisini P/F Wenzel í roknskaparfrágreiðingini fyri at vera í stríð við partafelagslógina. Partaeigarar í fyritøkuni hava eftir øllum at døma lánt sær sjálvum pening úr fyritøkuni, og hesum loyvir partafelagslóggávan ikki. Petur Petersen sigur, at lánini eru nú avroknað, og tey viðurskiftini eru komin í rætt lag.

# 3-arin og Tutl poppa víðari

**Næsta fløgan í Popplist røðini er komin í sølubúðirnar. Á Popplist 2 eru bæði vælumtókt løg frá í ár og gomul hitt. Úrvalið á fløguni fevnir breitt, so einki eigur at verða til hindurs fyri, at eisini Popplist 2 verður ein av best umtóktu fløgunum í ár.**

FLØGUÚTGÁVA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*Tveir fegnir fløguútgevarar, f.v Høgni Zachariassen fyri 3-arin og Kristian Blak fyri Tutl. Popplist 2 hevur breitt úrval, og hon verður óivað ein av best umtóktu fløgunum aftur í ár.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Popplist 2 er nú komin í sølubúðirnar. Seinnapartin hósdagin var almenn samkoma í 3-aranum fyri nýggjastu føroysku fløguútgávuni. Popplist 2 er ein savnsfløga við gomlum og nýggjari føroyskum løgum. Fyrsta Popplist fløgan av sínum slagi varð útgivin í fjør, og sambært Høgna Zachariassen er ætlanin at halda á við at geva Popplist fløgurnar út á hvørjum ári. Eins og í fjør samstarva Tutl og 3-arin um fløguútgávuna

Popplist var mest selda fløgan í 3-aranum í fjør, og útgevarnir vóna, at fløgan fær somu undirtøku í ár

## Breitt úrval

Endamálið við fløguútgávuni er at samantvinna tey bestu føroysku løgini í árinum, saman við gomlum hittum. Popplist 2 er einki undantak. Bólkar frá Prix Føroyum, Guðrun, Teitur og Brandur eru í millum tónleikarar, ið eiga løg, ið eru útkomin íár.

Chase og Plúmm eru tveir av bólkunum, ið borga fyri gomlu hittunum við ávíkavist Fyrstu ferð og Stjørnuskot. Pláss er eisini fyri vælumtókta trubadurinum, Kára P, so úrvalið á fløguni fevnir rættiliga breitt.



Giktafelag Føroya eitt virkið felag:

# Blaðútgáva, jólakort og fyrilestrar

**– Okkara fremsta mál er at upplýsa, og tað fara vit at halda fram við at gera, sigur formaðurin í Giktafelag Føroya, Leila Solmunde**

UPPLÝSING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Giktafelag Føroya sær upplýsing sum eina stóra uppgávu. Formaður felagsins er Leila Solmunde*
*Mynd: Vimund Jacobsen*

Giktafelag Føroya er eitt rættiliga virkið felag. Av limafeløgum MBF's, Meginfelag teirra Brekaðu, er felagið tað einasta, sum gevur eitt blað út.

Blaðið, sum er sera snotuligt, ber heitið, Giktablaðið, og kemur út tvær ferðir um árið. Fyrra blaðið í ár, sum var 36 blaðsíður, kom í apríl, og seinna blaðið kemur nú í november. Tey, ið taka sær av Giktablaðnum fyri felagið, arbeiða ólønt, hóast útgávan fer við nógvari tíð.

– Blaðútgávan kostar okkum einar 30.000-40.000 krónur um árið, og tá ið torført er at fáa lýsingar, er greitt, at neyðugt er at fíggja útgávuna á annan hátt.

Leila Solmunde, formaður í Giktafelag Føroya, sigur, at felagið brúkar nógva orku til tess at útvega pening til arbeiði felagsins.

– Vit halda, at kunning hevur ógvuliga stóran týdning í felagsarbeiði, og tað hevur eisini alstóran týdning fyri tey giktsjúku, at tey verða kunnaði við góðum ráðum og upplýsandi tilfari, heldur hon.

## Jólakort

Leila ásannar, at Giktafelagið hevur "ringt" við at biðja pening, og tí hevur felagið í nøkur ár selt jólakort, sum feløg, stovnar og fyritøkur hava keypt. Hetta lættir samstundis um hjá teimum, sum skulu senda fleiri jólakort út til nógv viðskiftafólk.

– Við søluni av jólakortum fíggja vit okkara blaðútgávu og harvið okkara upplýsingararbeiði, sigur hon.

Í ár hevur Giktafelag Føroya latið tvey jólakort prentað. Tað eru føroysk listafólk, sum lata málningar ókeypis til endamálið, og í ár er listamaðurin, Archibald Black.

– Tey, sum keypa jólakortini, hava tikið ógvuliga væl ímóti okkum, og tað eru vit sera takksom fyri.

Leila Solmunde vísir á, at almenni stuðulin uppá 20.000-25.000, sum felagið fær umvegis MBF, Meginfelag teirra Brekaðu, røkkur ikki langt. Hesin fer til húsaleigu til skrivstovu felagsins, frímerkir og telefon.

## Heimasíða

Giktafelag Føroya er eisini í holt við at gera sær eina nýggja heimasíðu.

– Hendan verður skjótt liðug, og heitið á síðuni verður www.gikt.fo.

Leila leggur dent á, at Giktafelagið sær tað, sum eina stóra uppgávu at upplýsa.

– Tað seinasta nýggja í hesum sambandi er, at vit hava vitjað økisheimarøktina við fyrilestrum. Her hava vit lagt dent á tað at vera brúkari av eini hjálparskipan.

Hon sigur, at málið hjá Giktafelagnum við hesum er at geva heimahjálpunum góð ráð um hjálpartól og nýtslu av hesum, um fyribyrging av arbeiðsskapum og øðrum.

– Okkara fremsta mál er at upplýsa, og tað fara vit at halda fram við at gera, sigur formaðurin, Leila Solmunde.

At enda kunnu vit leggja aftrat, at Giktafelag Føroya, sum er stovnað í 1948, fyllir 55 ár í ár.





*Hetta eru jólakortini, sum Giktafelag Føroya hevur latið gera í ár. Listamaðurin er Archibald Black. – Gongst sum ætlað, dettar sølan av jólakortum blaðútgávuna, sigur Leila Solmunde*